# Umsókn um broyting í galdandi lærusáttmála

Yrkisútbúgvingarlógin §§ 36, 37 og 38 heimilar, at ásetta lærutíðin kann verða stytt ella longd. Aftan á royndartíðina, sum er 6 mánaðir, kunnu sáttmálapartarnir bert ógilda sáttmálan, um báðir partar eru samdir um hetta og skriva undir umsóknina um ógilding.

Yrkisdepilin skal góðkenna og skráseta allar broytingar, sum gjørdar verða í einum lærusáttmála. Í sambandi við umsókn um broyting í verandi lærusáttmála, er á hinari síðuni ein vegleiðing til umsøkjararnar.

| | |
|---|---|
| Navn á læruplássi | |
| Heimstaður | |
| V-tal | |

| | |
|---|---|
| Heiti á útbúgvingini | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navn á lærlingi | | | |
| Bústaður | | | |
| Føðingardagur | | Skúli | |

*Navn, bústaður/heimstaður, føðingardagur og V-tal skal samsvara við lærusáttmálan*

Søkt verður um

| |
|---|
| at seta lærusáttmálan úr gildi frá |
| at lærutíðin verður broytt til at enda tann |
| annað |

Grundgevið fyri ynskinum um at broyta sáttmálan:

| |
|---|
| |

*Dagfesting*

*Undirskrift virkisleiðarans*

*Undirskrift lærlingsins*

*Undirskrift verjans*

Umsóknin skal sendast í telduposti til *yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo*

# Vegleiðing

## Leingjan av lærutíð

Sambært §§ 35 og 36 í yrkisútbúgvingarlógini er ásett, at lærlingur og lærupláss kunnu gera avtalu um at leingja útbúgvingartíðina. Eru lærlingur og lærupláss ikki samd um at leingja útbúgvingartíðina vegna fráveru, sum nevnt í stk. 1 í umrøddu lógargrein, kann yrkisnevndin, eftir áheitan frá pørtunum, áseta longda tíðarskeiðið. Eru partanir samdir um at leingja útbúgvingartíðina eftir § 36, skal fráboðan um hetta gerast á hesum oyðublaði. Bæði lærlingur og lærupláss skulu undirskriva fráboðanina á hinari síðuni.

## Leingjan ella stytting av lærutíð

Sambært § 37 í yrkisútbúgvingarlógini er eisini ásett, at í øðrum førum enn teimum, ið nevnd eru í §§ 35 og 36, kann yrkisnevndin, tá ið serlig viðurskifti tala fyri tí, samtykkja at stytta ella at leingja útbúgvingartíðina.

Er talan um leingjan ella stytting av ásettu lærutíðini eftir § 37, skal umsókn um hetta sendast til yrkisnevndina (Yrkisdepilin). Góðkenningin er vanliga treytað av, at bæði lærlingur og lærupláss undirskriva umsóknina á hinari síðuni.

## Uppsøgn av lærusáttmála

Sambært § 37 í yrkisútbúgvingarlógini er harumframt ásett, at um onkur týdningarmikil treyt fyri at gera lærusáttmálan er skeiv ella seinni dettur burtur, kann hin parturin siga sáttmálan upp. Aftaná royndartíðina, sum er 6 mánaðir, kunnu sáttmálapartarnir bert ógilda sáttmálan, um báðir partarnir eru samdir um ógildingina. Verður lærusáttmáli sagdur upp, skal fráboðan um hetta gerast á hesum oyðublaði. Bæði lærlingur og lærupláss skulu undirskriva fráboðanina á hinari síðuni.

### Tilskilað Yrkisdeplinum

*Møguligar viðmerkingar*

| | |
|---|---|
| ☐ | játtað / játtað við tillaging |
| ☐ | ikki játtað |

*Dagfesting* ____________________ *Undirskrift* ____________________